Leygardagur

Dimmalætting

»Okkara Gulu«

Nr. 135 • 119. árgangur • 31. august 1996 • Tlf. 11212 • Fax 10941 • e-mail: dimma@olivant.fo

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

7 kr.

Neyðætlanin í Lopra enn ikki góðkend av umsjónini

Brunaumsjón Landsins hevur framvegis ikki goðtikið neyðætlanina í Lopra. Brunaumsjónin setti fram spurningar, sum teir vildu hava svar uppá. Danop hevur svarað, men svarskrivið er alt ov ofullfiggjað. Vit eru lopnir fram av í oljuspurninginum, heldur landsverkfrøðingurin, Henning Jacobsen.

DIA MIMJORD

Leiðarin á Brunaumsjón Landsins, Petur Olsen og landsverkfrøðingurin Henning Jacobsen hava enn ikki goðkent neyðætlanina, sum Danop hevur í sambandi við eina olukku í Lopra.

Tað er nakað síðan, at teir settu Danop nakrar fyrispurningar og hava eisini fingið eitt svarskriv. Men hetta svarskriv er alt ov ofullfiggjað.

Teir filast á, at viðurskiftini her hjá okkum verða sammett við viðurskiftini aðrastaðni, har teir hava tilbugvingarskipanina í trimum stigum: á staðnum, komunalt og nationalt. Tí vit hava einans kommunalu partin og hesin er minimalur. Landsumfevnandi tilbugvingin finst ikki í Føroyum í løtuni.

Landsverkfrøðingurin heldur, at vit í sambandi við oljuna hava verið í so skjótir á sjóvarfallinum.

– Hendir ein olukka í Lopra og eitthvørt kemur úr undirgrundini, so er tað neyvan nakað, sum ein klárar við einum skumsløkkjara, sigur Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur.

Lesið á síðu 3

Bjargingararbeiðið á Svalbard farið í gongd

Fyri fyrstu ferð, síðani russiska Tupolev-flogfarið datt niður á Svalbard fyrrapartin hósdagin, sluppu tyrlur seinnapart friggjadagin fram at vrakinum.

EMIL L. JACOBSEN

(REUTER) Beint aðrenn blaðið fór til prentingar sluppu tær fyrstu tyrlurnar fram at vrakinum av russiska Tupolev-flogfarinum, sum datt niður á Svalbard hósdagin.

Aðrenn hevði tjukkur mjørki og ringt veður við kava og regni forðað tyrlunum í at sleppa til staðið, har vrakið liggur.

Tað voru 141 fólk við flogfarinum.

Har av taldi manningin tolv.

Hini voru ukrainskir kolanámsarbeiðarar, sum saman við familjum voru á veg til fjarskotnu, norsku oynna.

Á einasta flogvølli á oynni stóðu aðrar familjur og biðaðu eftir at sleppa heim við sama flogfari.

Sagt varð, at av teimum 141, sum lotu liv, voru sjey børn og 40 kvinnur.

Tað er sera trupult at sleppa til, har vrakið av flogfarinum liggur.

Vrakið liggur í eini fjallalíð, og partar av tí gliða oman gjøgnum líðina.

Skalvalop og ísbjarnir

Vandi er fyri skalvalopum, og tað kemur fyri, at ísbjarnir eru har á leiðini.

Á Svalbard verður tað vanliga mett sum vitloysi at fara úr eini av teimum trimum bygdunum á oynni uttan at hava byssu uppi á sær, orsakað av bjørnunum, sum higartil í ár hava dripið tveir mans.

Tað er enn ikki greitt, hví flogfarið rendi á fjallið.

Í løtuni verða tveir møguleikar havdir á lofti. Antin misti flogfarið kósina, ella fleyg tað ov lagt.

Bjargingarliðini vona at vinna teir báðar svørtu kassarnar, sum voru umborð á flogfarinum.

Tornið á flogvøllinum í Longyearbyinum, sum er størsta búseing á Svalbard, hoyrdi einki ovanligt, aðrenn vanlukkan hendi, og flogskiparin boðaði heldur ikki fra nøkrum oregluligum.

Síða 8

Hjarta-æðra sjúkur størsta deyðsorsøkin

Føroyar hoyra til tey Norðurlond, har flest doyggja av hjarta-æðra sjúkum. Bert í Grønlandi doyggja fleiri av hesi orsøk. Bert í Grønlandi og Finnlandi eru fleiri sjálvmorð enn í Føroyum

GEORG L. PETERSEN

Bókin, sum í hagtølum lýsir heilsustøðuna í Norðurlondum, er júst komin.

Í tí rugvismikla tilfarinum sæst m.a., at tað eru hjarta-æðrasjúkur, sum í øllum londunum er størsta deyðsorsøkin.

Hevdu vit verið 100.000 fólk í Føroyum, voru 497 deyð av hesi orsøk. Í Danmark er sama talið 424. Bert eitt Norðurland kemur upp um Føroyar í hesum samnhangi, og tað er Grønland. Har er talið nógv størri, 750. Sagt verður to í eini frágreiðing yvir tølini, at grønlendska talið svingar ometaliga nógv. Frágast er í Íslandi, har talið er 361. Hesi tølini eru yvir menn – talið yvir kvinnur er nærum dupult so lagt í flestu forum. Hagtølini fyri Føroyar eru nýggj og hava ikki verið við ófta áður. Tí kann vera trupult at siggja eina gongd. Men í hinum Norðurlondunum hevur talið á fólki, sum eru deyð av hjarta-æðrasjúkum minkað álmikið seinastu árini.

Nógv sjálvmorð

Tað hevur verið frammi, at í Føroyum eru ikki so nógv sjálvmorð, samanborið við onnur lond. Tað er ikki heilt rætt, tí samanborið við Danmark tóku lutfalsliga fleiri menn sítt egna liv enn í Danmark.

Í Føroyum er talið fyri menn 79,2 og í Danmark 76,9. Fyri kvinnur eri tølini ávikavist 21 og 43. Støðan er bara verri í Finnlandi og so Grønlandi, sum er nógv hægst, við einum talið yvir menn upp á 205 og fyri kvinnur upp á 109.

Í BLAÐNUM Í DAG

Stór upptakt undan landsdystinum í dag

Hóskvøldið var Dimmalætting til staðar á Svangaskarði, tá landsliðið vandi. Har prátaðu vit við nakrar av spælarunum og venjaran Allan Simonsen. Eisini hava vit okkurt um slovakiska motstøðuliðið, sum ikki fekk lent hósdagin, og tí ikki kom til Føroya fyrr enn í gjár.

Síða 4, 5 og 6

Nótabátarnir leita eftir sild norðuri í myrkrinum

Um sildin fylgdi gamla mynstrinum, so skuldi hon ongantið verið farin úr føroyskum sjógvi í summar. Higartil hevur heldur eingin funnið sild á teimum vanligu leiðunum norðan fyri Føroyar. Í løtuni leita nótabátarnir norðanfyri, men í gjár høvdu teir ikki rakt við sildina.

Síða 3

Tøvd ull í nútíðar sniði

Í gjár lótu Barbara í Gongini og Armgarð Weihe upp eina framsýning, tær kalla »Norðurlendskar reflektionir«. Hetta er tøvd ull í nútíðar sniði. Smiðjan í Litluvík er karmur um framsýningina.

Síða 10

Trettan hús reinsað fyri fýr

Á triðja sinni er danska fyritøkan a/s Mortalin í Føroyum og reinsar hús fyri fýr. Arbeiðið er um at vera liðugt fyri hesaferð, og tilsamans hava teir reinsað trettan hús fyri fýr.

Síða 10

Luxembourg vil gera hash lógligt

Tað hevur leingi verið vanligt í Amsterdam í Hollandi, at kaffistovurnar hava loyvi til at selja smærri nøgdir av hashi. Liberala lógin í Hollandi er nú eisini farin at ávirka lítla landið Luxembourg, sum vil gera cannabis lógligt.

Síða 8

Dripin fyri sjey dollarar

(REUTER) Olga Lavrentyeva varð friggjadagin stungin til deyðis av einum gøtuhandilsmanni.

Hósdagin hevði Lavrentyeva, sum var dómari, dømt tann 41 ára gamla Valery Ivankov at rinda sjey dollarar í bót fyri at hava handlað ólogliga við klæðum á gøtuni í Moskva.

Dagin eftir kom Ivankov inn í rættarhølið og stakk dómaran við einum knivi. **elj**

✔ Bøkur ✔ Heftir
✔ Brævørk ✔ Kontoavrit
✔ Brævbjálvar ✔ Visitkort
✔ Fakturar ✔ o. m. a.

Verður skjótt og væl greitt úr hondum á

Dimmalætting

Tlf. 11212 • Fax 17681

Dansur í Ítróttarhøllini á Kambsdali

Í kvøld 31. august frá kl. 23

Millum Frændir spælir.

ÍF-Stuðlar

DAGSINS RÆTTUR

MÁNADAG 02.09.: Farsbreyð
TÝSDAG 03.09.: Grýturætt
MIKUDAG 04.09.: Knættir ella pylsurætt
HÓSDAG 05.09.: Lambafrikassé
FRÍGGJADAG 06.09.: Fleskasteik
LEYGARDAG 07.09.: Kotelettir

VIKA 36 Perlan

Nótabátarnir leita eftir sild norðuri í myrkrinum

Um sildin fylgdi gamla mynstrinum, so skuldi hon ongantíð verið farin úr føroyskum øki í summar. Higartil hevur heldur eingin funnið sild á teimum vanligu leiðunum norðan fyri Føroyar. Í løtuni leita nótabátarnir eftir stóru sildini norðuri í myrkrinum, men í gjár høvdu teir ikki rakt við.

DIA MIDJORD

Reiðarin á Krunborg og Norðborg, Eiler Jacobsen, sigur, at atlantoskandiska sildin tivern ikki hevur fylgt gamla mynstrinum.

– Eingin hevur sæð sild á teimum vanligu sildaleiðunum. Um hon hevði fylgt gamla mynstrinum, so var hon ongantíð farin úr føroyskum øki í summar, sigur hann.

Í løtuni leita teir flestu føroysku nótabátarnir eftir sild norðuri í havinum.

Sæð við Jan Mayen

Eftir gamla mynstrinum kom garnaaldin fyri um hálvan juli, tá bátarnir byrjaðu at fiska norður úr Føroyum. Seinni var hon á leiðunum við Eysturlandið og norður móti Jan Mayen, har hon stóð nærum alt summarið. Út á heystið savnaðist sildin nógv einar 50 fjørðingar úr Eysturlandinum.

Eiler Jacobsen sigur, at mynstrið hjá sildini í dag nærum ikki kann fastleggjast.

– Sildin er síðst sædd eystur úr Jan Mayen. Teir, sum leita eftir sild siga, at sildin stendur við Jan Mayen um summarið, men flytur seg síðan aftur eystureftir móti Noregi. Út á heystið fer hon so inn aftur á Vestfjørðin og er á leiðunum við Lofoten.

Eiler Jacobsen sigur, at eftir gamla mynstrinum høvdu norðmenn sildina einar triggjar mánaðir, meðan íslendingar og føroyingar høvdu ágóðan av sildini restina av árinum. – Tað var hetta mynstrið, vit vónaðu at siggja aftur, sigur hann.

Kortini gott ár

Krunborg hevur kastað einaferð á leiðini 69° N og 10° E. Ikki nógv sild kom í, so hon bleiv saltað. Annars var hetta rættiliga góð sild við 20 prosent av fiti.

Eiler Jacobsen sigur, at fyrr vildu sviar ikki keypa sildina, fyrr enn hon var 18% feit. Hetta er eisini besta sildin til at salta og kryddra. Um skerast skal til flak, so skal sildin ikki vera alt ov feit.

Men hvussu so enn verður við sildini, so hevur arið hjá føroysku nótabátunum roynst vælt.

– Tað hevur verið eitt ómetaliga gott ár, sigur Eiler Jacobsen, sum er keddur av, at fiskiskapurin eftir makreli undir Føroyum varð steðgaður.

– Mest loyvda veiða samanlagt fyri makrel var 14.200 tons. Vit hava landað allar lastirnar í Noregi, so heildarveiðan er farin upp um hetta markið. Føroyski makrelurin hevur ongantíð verið roknaður upp í MLV-ið, so vit roknaðu við, at hetta var uttan fyri vanligan fólkaskikk, sigur Eiler Jacobsen.

Eiler Jacobsen: – Tíverri hevur sildin ikki tikið upp gomlu sildaleiðina, har hon einans var triggjar mánaðir hjá norðmonnum og heilar níggju mánaðir hjá okkum og íslendingum



Í løtuni leita føroysku nótabátarnir eftir sild norðuri í myrkrinum

Mynd: Diml/bs

Millum 100 aðrar fingu tveir føroyingar bretskt legat

Tað verður eitt sórt hátíðarhald á bretsku sendistovuni í Keypmannahavn 10. september. Orsøkin er, at nøkur lesandi hava fingið legat frá bretsku myndugleikunum og vinnulívinum. 100 umsøkjarar vóru. 14 vórðu vald burturúr – har imillum tveir føroyingar.

Tað eru Richard Schwartson, farmaceutur og Bjarni Mortensen, sum lesur við Roskilde University Universitetscenter, sum hava fingið legatini.

Virðisløna ber enska heitið British Chevening Scholarships, og tað er bretska uttanríkismálaráðið, sum stendur aftanfyri legatið. Men vinnulívið er eisini virkið og letur ein part av upphæddini, sum skal dekka allar útreiðslur í sambandi við lesnaðin í ávikavist eitt ár ella eitt hálvt ár.

Endamálið er at lata legatini til framtíðar leiðarar og persónar, sum annar koma at mynda kjakið í heimlandinum og sita og taka avgerðir. Hesi skulu við legatinum fáa eitt innlit í bretska samfelagið og málið.

– Richard Schwartson kenna tey flestu frá Tjaldurs Apoteki, haðani hann hevur farloyvi til viðari lesnað í Onglandi. Hann er í løtuni staddur. Hann lesur á De Montfort University í Onglandi, har hann hevur lagt seg eftir menning av nýtsluskipanum innan informatión.

Bjarni Mortensen lesur í løtuni í Roskilde, og skal í Manchester lesa viðari í fyristing.

Tað verður bretski sendiharrin í Danmark, sum handar føroyingunum og hinum legatini 10. september.

Brunaumsjónin hevur enn ikki góðkent neyðætlanina í Lopra

Tilbúgvingarætlaninin hjá Danop í sambandi við boringina í Lopra er enn ikki góðkend av Brunaumsjón Landsins. Danop fekk eitt skriv um hetta og svaraði eisini aftur til Brunaumsjónina. Men hetta svarið er ikki nóg fullfiggjað. Brunaumsjónin veit ikki rættiliga, hvussu hon skal sleppa víðari við málinum.

DIA MIDJORD

Leiðarin á Brunaumsjón Landsins, Petur Olsen og landsverkfrøðingurin Henning Jacobsen eru framvegis ikki nøgdir við tilbúgvingarskipanina í Lopra. Trupulleikin er, at vit í Føroyum hava onki grundarstig í eini tilbúgvingarskipan.

– Okkara viðurskifti kunnu og skulu ikki samanberast við viðurskiftini í Danmark, Noregi ella aðrastaðni, har tilbúgvingarskipanin eru bytt sundur í fleiri stig - á staðnum, kommunalt og nationalt. Í Føroyum hava vit einans tað kommunala, ið avgjørt er á einum minsta marki. Landsfevnandi tilbúgvingin er ikki til í løtuni, sigur Petur Olsen, leiðari á Brunaumsjónini.

Sett spurnartekin

Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur, sigur í hesum sambandi, at trupulleikin hjá okkara lítla samfelag er, at vit hava ikki øll hesi amboðini og alla útgerðina, sum onnur størri lond hava.

– Ikki er neyðugt hjá teimum at sleipa alla útgerðina til Føroya, tí talan er ikki um nakra risastóra boring.

– Men frágreiðingin má vera meira neyv. Hon sigur einki um, hvørji amboð ella útgerð er tøk, hvussu hetta fæst til landið, hvussu skjótt hetta kann gerast og hvør skal gera hetta arbeiðið, sigur Henning Jacobsen.

Tá tit enn ikki hava góðkent neyðætlanina, hvat fara tit so at gera næst.

– Tað er torført at siga. Men vit seta framvegis spurnartekin við neyðætlanina. Best var um allir partar settu seg saman og fingu tingini upp á pláss, sigur landsverkfrøðingurin, ið ikki veit, hvat skal henda viðari í hesum málinum.

Lopnir framav

Landsverkfrøðingurin sigur, at í svarskrivinum frá Danop eru nakrar rættingar gjørdar eftir teimum atfinningum, sum Landsverkfrøðingurin gjørdi vart við í byrjanini. Men Henning Jacobsen heldur, at svarskrivið ikki nóg neyvt gevur svar upp á ting, sum eru rættiliga týðandi.

Landsverkfrøðingurin heldur, at vit føroyingar hava verið í so skjótir á sjóvartallinum í sambandi við oljuna. Hann heldur, at føroyingurin hevur lindið til at taka hattin av fyri øllum, ið er internationalt.

Men sjálvt arbeiðsplássið í Lopra er sjálvandi trygt og í góðum hondum, men tað er tað ókenda, sum vit ikki megna at takla.

– Hendir ein ólukka og eitthvørt óvæntað kemur úr undirgrundini, so er tað neyvan nakað, sum ein klárar við einum skúmsløkkjara, sigur Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur.

Tvær legur fyri brekað í Nesvík

Tær vælumtóktu legurnar fyri brekað og avvarð andi verða síðst í hesum mánaðinum

Tey bæði seinastu vikuskiftini í september verða tvær legur fyri brekað og avvarðandi.

Lega I verður 20.-22. september og lega II verður 27.-29. september. Legurnar verða báðar hildnar í Leguhúsinum í Nesvík.

Í fjør vóru ikki færri enn 240 fólk tilsamans á báðum legunum: 100 á fyrru leguni og 140 á seinnu leguni. Legurnar eydnaðust sera væl, og vóna fyrireikararnir, at legurnar í ár eisini fáa góða undirtøku.

Brekað í øllum aldri, og við teimum brekum, tey hava, kunnu koma á legu. Eisini tey, ið varða av foreldur, systkin ella onnur, sum eru um tey, eru vælkomin.

Eink aldursmark er sett á, og ti verða luttakarar í øllum aldri.

Gott er, at fólk við ymiskum brekum eru saman á einum stað, soleiðis at øll kunnu læra at vísa tolsemi móti hinum og umsorgan móti øðrum við øðrvísi breki enn ein sjálvur.

Nógv er á skránni á leguni: Sangur, spøl, itriv, gonguturar, hugnakvøld, andaktir og fyrilestrar og bólkaarbeiði fyri tey avvarðandi. Legan endar við gudstænastu í Leguhúsinum.

Fyrilestrar vera um brekað í Afrika og um hjálpitól og hjálpitólamiðstøðina.

Skrain fyri báðar legurnar er tann sama.

Leguhúsið er væl egnað at hýsa brekaðum, við tað at tað er rúmligt, og ikki eru nógvar trappur. Sóvið verður í 8-mans kømrum við we og brusu. Í húsinum eru spælirum til børnini og uttanfyri er stórt spælipláss. Góð rum eru eisini at hugna sær í.

Seinasta freist at tokna seg til legurnar er 14. september.

Í fjør vóru 240 fólk á leguni fyri brekað, ið vóru í Leguhúsinum í Nesvík.